# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar

14. desember fingu Iris Strøm og Magnus Winther, Vágur, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4170 gr.

14. desember fingu Leila og Elian Hansen, Vágur, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4400 gr.

18. desember fingu Karin Elisa og Odd Svøðstein, Lamba, eina dóttur. Hon vigaði 1180 gr.

19. desember fingu Susanne Askham, Fuglafjørður, og Heri Vestergaard, Sumba, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3960 gr.

20. desember fingu Gunnvá Bærentsen og Mortan Ovi Mortensen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4200 gr.

20. desember fingu Sólva Óladóttur Jóhannessen og Johannes Asbjørn Weihe, Fuglafjørður, ein son. Hann 56 cm langur og vigaði 4350 gr.

22. desember fingu Anita Arge og Jens Kartin Rasmussen, Æðuvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3500 gr.

25. desember fingu Rebekka og Rói Norðoy, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3500 gr.

26. desember fingu Fríðunn Steinberg Mellemgaard, Klaksvík og Jari Mellemgaard, Hvalba, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3610 gr.

26. desember fingu Annebet Abrahamsen og Atli Jacobsen, Vágur, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3850 gr.

26. desember fingu Bjørt Joensen Dahl, Norðskáli, og Danny Rasmussen, Argir, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3055 gr.

28. desember fingu Borgfríð Jakobsen og Hjalmar N. Jakobsen, Nólsoy, ein son. Hann var 46 cm langur og vigaði 2350 gr.

28. desember fingu Sarah Khaliqhey og John Edvin Joensen, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3500 gr.

31. desember fingu Olivia og Jákup Berg, Hoyvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3300 gr.

31. desember fingu Joan og Peter Mouritsen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3400 gr.

2. januar fingu Katrin og Jón Helmsdal, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3600 gr.

2. januar fingu Herdis Jacobsen og Julian Eliasen, Kollafjørður, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3525 gr.

2. januar fingu Maria Vang Justinussen og Niels Pauli Justinussen, Leirvík, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4200 gr.

3. januar fingu Elin Maria og Tórur Bærentsen, Skála, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4100 gr.

3. januar fingu Irdi Danielsen og Kim Hansen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4400 gr.

3. januar fingu Durita Johansen og Hans Jákup Andreasen, Streymnes, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4100 gr.

3. januar fingu May Dahl Sørensen, Viðareiði, og Hákun Egilsnes, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 2430 gr.

4. januar fingu Fríða og Bogi Jensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3400 gr.

6. januar fingu Hjørdis Mohr, Hoyvík, og Árant Djurhuus Kollafjørður, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3175 gr.

6. januar fingu Katrin og Erland Poulsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3650 gr.

7. januar fingu Diana Joensen og Eirik Joensen, Skála, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3400 gr.

## Dagurin

**8. januar. Erhardus ella Erhardt.** Írskur munkur, sum doyði um ár 700. Ella kanska er talan um ein týskan biskup, sum fyri undurgerðir sínar verður skírdur halgimenni. Týskt navn, samansett av æra og harður.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

## Prógv

17. des. 2009 fekk Torkil Ejdesgaard, Tórshavn, handað prógv sum Master of Science in Culture and Society á The London School of Economics and Political Science (LSE).



# Gullbrúdleyp

Leygardagin 9. januar 2010 halda Patricia vanliga nevnd Disan og Vilmund Ryggshamar í Lamba gullbrúðleyp.

Tey blivu gift 6.desembur 1959, og brúðleypið varð hildið í Lamba í barnaheiminum hjá Disuni inni hjá Meinhardi og Albertu Gaardlykke fyri fimmti árum síðani.

Vilmund, mammubeiggi mín er uppvaksin í Vági, og hevur fyri tað mesta búð í Vági, og hansara barnaheim var vesturi við Vatnið. Tey keyptu hús í fimmtiárinum, úti á Marknoyri í Vági, frá ommubeiggjanum mínum Niclas Hovgård.

Annars hava Vilmund og Disan búð í Lamba tey seinastu árini, í barnaheiminum hjá Disuni.

Vilmund er sonur Jens og Alvildu Ryggshamar í Vági.

Vilmund og Disan fingu sonin Tummas, sum eisini er útbúgvin skipari. Tummas eigur 3 børn saman við Heidi Thomsen úr Sumba, og tann eini sonurin hjá teimum er uppkallaður eftir abbanum, og hann ber navnið Mattias Vilmund. Vilmund og Disan eru eisini sera glað fyri familjuna og ikki at gloyma ommu- og abbabørnini.

Her skal eisini nevnast, at Vilmund sjálvur er uppkallaður eftir abbabeiggja mínum Villiam, sum gekk burtur undur Íslandi við „Lauru“ 10. apríl 1932, bert 20 ára gamal.

Vilmund fór til skips sum 14 ára gamal við Johannu, og pápi hansara (Jens abbin) var kokkur.

Vilmund var síðani við Beinisvørð í trý ár, til hann í 1954 fór á skiparaskúla. Fyrsta skip, hann var skipari á, var “Karl”. Hann var eisini við norskum trolara sum Niclas Hovgård, ommubeiggi mín, førdi.

Vilmund var skipari við “City of Norwich”, og tá Jóan P. hjá Mouritsi, sum var skipari á “Saksaberg”, doyði umborð, fór Vilmund tá umborð á Saksaberg sum skipari. Hann var eisini eitt skifti skipari við “Sjófarinum”, sum beiggi hansara Jógvan átti.

Fyrst í 70-unum fekk Vilmund starv sum vrakieftirlitismaður í Vági, og var hann í hesum starvi til fyrst í 90-unum.

Vilmund hevur altíð havt stóran hug til sjólívið og hevur eisini tey seinastu árini róð út saman við Arna systkinabarninum hjá mær og saman við beiggja sínum Jógvani sum eisini er skipari. Hóast



báðir eru farnir uppum 70 ár, spælir aldurin ikki tað stóra inn. Báðir duga sítt sjómansfak til fulnar.

Arni hevur mangan fortalt mær góðar søgur um beiggjarnar Vilmund og Jógvan. Arni plagar at siga frá, hvussu tað er at vera saman við Vilmundi á sjónum. Arni sigur at tað sera gott at vera á sjónum saman við Vilmundi, tí hann er so stuttligur og arbeiðssamur maður.

Vilmund er ein sera fyrikomandi persónur og er sum oftast í góðum lagi, og hann kann fortelja eitt hav av stuttligum søgum, og væl liggur tað fyri at siga frá og gera søgurnar áhugaverdar. Serliga minnist eg søgurnar hjá Vilmundi um Karl á Marknoyri, sum eisini var ein sera stuttligur og vitandi maður.

Eg upplivdi eisini at ferðast saman við Vilmund og Disuni í 1991, tá vóru vit í Scotlandi í Petenween og vitjaðu familjuna hjá pápa mínum. Tað var ein góður túrur, hóast Vilmund altíð var í bilinum hjá sær og lurtaði eftir Útvarpi Føroya. Sum ein rættur sjómaður og gamal skipari var tað serliga tíðindir um fiskiskap og veðurtíðindi hann vildi hoyra um úr móðurlandinum.

Eg vil eisini takka Vilmundi fyri, at hann tímdi at hoyra upp á meg um streym, streymkort, veðurkort, og um ” lav og-højtryks passage over Førøerne” og fiskuvinnu generelt, tá ið eg var yngri og gekk á miðnámsskúla í Vági. Men sjáldan havi eg fingið brúk fyri tí.

Vilmund, tú hevur altíð verið lívsglaður persónur, men seinastu tíðina er heilsan tær versnað eitt sindur, men tú ert tíðbetur komin fyri teg aftur og hevur tað betur, og tað eru vit øll glað og takksom fyri.

Eg minnist eisini aftur á mínar barnadagar, tá ið vit komu inn á gólvið hjá tykkum á Marknoyri. Vit vóru so nógv systkin, og tað kom fleiri ferðir fyri, at onkur av okkum ikki vildi heim aftur við mammu og pápa, tí tað var so gott, trygt og hugnaligt at koma inn í heimið hjá tykkum á Marknoyri í Vági.

Eisini kann eg koma í tankar um sera góðar dagar í Lamba og á Nesi, tá ið eg var har norðuri og vitjaði familjuna hjá Disuni, hetta hendi um ólavsøku tíð í 1980.

Disan kemur av einari fittari og góðari familju, serliga minnist eg aftur á sum smádrongur, tá ið vit vóru í Lamba og vitjaðu Albertu og Meinhard Gaardlykke.

Eisini minnist eg aftur á hvussu væl Disan dugdi at seyma, og hon seymaði gardinur og plagg fyri fólk. Disan var altíð klár at hjálpa til, um vit og onnur høvdu brúk fyri tí. Disan arbeiddi annars á flakavirkinum í Vági í nógv ár.

Ikki fyri at nevna um sjólívið fyri ein sovornan landkrabba sum meg, men mín fyrsti túrur til skips var við M/S Maj har bróður Disuna, Petur Anker Gaardlykke var skipari.

Eg vil at enda takka tykkum báðum við familju, fyri alt og ynskja tykkum hjartaliga tillukku við gullbrúðleypinum og guds signing framyvir.

**Levi Mørk, Hoyvík**
**07.01.2010**